Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Høgni Hoydal, løgtingsmaður

Svarari: Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í fiskivinnumálum

Evni: Avgerðir og treytir landsstýrismansins um játtanir og sýtingar av kvotum til vinnuligar royndir og verkætlanir, haruppií ítøkiligt skipakeyp

Spurningar:

1. Hvussu eru avgerðirnar um og grundgevingarnar fyri at ganga ímóti tilmælunum frá umsitingini um, hvørjum skuldi játtast kvotur til vinnuligar royndir og verkætlanir, haruppií ítøkiligt skipakeyp, skjalfestar, viðgjørdar og grundgivnar fyrisitingarliga?

2. Vórðu upplýsingar og metingar um avgerandi viðurskifti, sum landsstýrismaðurin sigur seg hava lagt dent á sum veruligar umstøður í málinum, skjalfestar og sendar til partshoyringar?

3. Luku teir umsøkjarar, ið landsstýrismaðurin valdi fram um aðrar, sum vóru tilmæltir av umsitingini, tey grundleggjandi høvuðskrøvini í lóg, kunngerð og metingarskjølum betur enn aðrir umsøkjarar? T.e.: nýskapan, virðisøking og menning, skjalprógvaðar keypssáttmálar fyri skip, fígging, rakstrarætlan, at kunna byrja beinanvegin v.m.?

4. Luku teir umsøkjarar, ið vórðu tilmæltir frá umsitingini, men sum landsstýrismaðurin vrakaði, tey grundleggjandi høvuðskrøvini í lóg, kunngerð og metingarskjølum? T.e.: nýskapan, virðisøking og menning, skjalprógvaðar keypssáttmálar fyri skip, fígging, rakstrarætlan, at kunna byrja beinanvegin v.m.?

5. Hvør var munurin í eginpeningi og í royndum at reka fiskivinnu, sum landsstýrismaðurin sigur seg hava lagt dent á, millum teir umsøkjarar, ið fingu játtan og teir, sum vórðu tilmæltir frá umsitingini – og hvussu varð hetta skjalprógvað og grundgivið í avgerðini?

6. Er tað rætt, at umsøkjarar, ið fingu játtan til ítøkiligt skipakeyp, nú hava útvegað skip, sum aðrir umsøkjarar, ið vórðu vrakaðir, høvdu keypssáttmála uppá?

Viðmerkingar:

Landsstýrismaðurin hevur svarað, at hann broytti tilmælini frá umsitingini og játtaði kvotur til onnur feløg, tí hann sigur seg leggja størri dent á eginpening og royndir at reka fiskivinnu hjá umsøkjarunum. Hesar treytir standa ikki í lóg, kunngerð ella metingarskjølum, og eru sostatt settar sum avgerandi treytir undir viðgerðini, uttan at umsøkjarar hava vitað um hesar treytir, sum verða sagdar at hava týdning fyri veruligu umstøðurnar í málinum.

Tí verður spurt, hvussu alt hetta er skjalfest, viðgjørt, vigað, partshoyrt og grundgivið í fyrisitingini, og hvussu høvuðstreytir annars eru loknar hjá umsøkjarum.

Á Løgtingi, 20. oktober 2021

Høgni Hoydal